

# Leita eftir milliardum til vindorkulund í Noregi

**Jógvan Hugo Gardar**

20.03.2015 - 20:11

Oljan.fo

Størsti norski orkuframleiðarin, statliga fyritøkan Statkraft, er farin at elita eftir íleggjarum til eina risa orkuætlan. Meiningin er at fáa íleggjarar at koma við góðum 2,5 milliardum norskum krónum til eina nýggja vindorkulund í Fosen, í Mið-Noregi, skrivar Dagens Næringsliv.

Talan er um størstu vindorkuætlan í Noregi higartil, og samlaði kostnaðurin liggur um sjey milliardir krónur. Statkraft leggur umleið fimm milliardir krónur inn í ætlanina.

Tað hevur tikið nógv ár at fáa í gongd útbyggingar í Noregi av vindorku. Mótstøðan hevur verið øgilig har hesar ætlaninar hava verið lagdar fram. Tey sum ikki ynskja vindorkulundirnar vísa á tvær høvuðsorsøkir til at vera imóti. Onnur er at vindmyllurnar síggjast so gott í náttúruni, og hin er at tær geva so nógvan gang fra sær. Ein triðja orsøk sum eisini hevur verið frammi, er at vindorkan ikki er støðug. Norska streymnetið er bygt

upp við brúk av vatnorku, og norvmenn eru vanir við at bruka næstan óavmarkað av vatnorku til ljós og hita í øllum bygningum.